Navnorð

Ein drongur, ein genta, eitt barn

Kallkyn - hann, kvennkyn - hon, hvørkikyn - tað

Óbundin navnorð – eitt barn, bundin navnorð – barnið

Sterkt bend navnorð enda við hjáljóði í hvørsfalli – úlvur/úlvs

Veikt bend navnorð enda við sjálvljóði í øllum føllum í eintali - dunna

Hvørfall	(hvør er her?)	vinur *in*	dunna *n*	barn *ið*
Hvønnfall	(hvønn sást tú?)	vin *in*	dunnu *na*	barn *ið*
Hvørjumfall	(hvørjum møtti tú?)	vini *num*	dunnu *ni*	barni *num*
Hvørsfall	(hvørs er tað?)	vinar *ins*	dunnu *nnar*	barns *ins*

Hvørfall	(hvør er her?)	vinir *nir*	dunnur *nar*	børn *ini*
Hvønnfall	(hvønn sást tú?)	vinir *nar*	dunnur *nar*	børn *ini*
Hvørjumfall	(hvørjum møtti tú?)	vinu(m) *num*	dunnum *num*	børnu(m) *num*
Hvørsfall	(hvørs er tað?)	vina *nna*	dunna *nna*	barna *nna*

Skyldskaparorð

Eintal

Hvørfall	faðir	móðir	bróðir	dóttir
Hvønnfall	faðir	móður	bróður	dóttur
Hvørjumfall	faðir	móður	bróður	dóttur
Hvørsfall	faðirs	móður	bróður	dóttur

Fleirtal

Hvørfall	fedrar	møður	brøður	døtur
Hvønnfall	fedrar	møður	brøður	døtur
Hvørjumfall	fedrum	møðrum	brøðrum	døtrum
Hvørsfall	fedra	møðra	brøðra	døtra

Eintal

Hvørfall	systir	fastir	mostir
Hvønnfall	systur	fastur	mostur
Hvørjumfall	systur	fastur	mostur
Hvørsfall	systur	fastur	mostur

Fleirtal

Hvørfall	systrar	fastrar	mostrar
Hvønnfall	systrar	fastrar	mostrar
Hvørjumfall	systrum	fastrum	mostrum
Hvørsfall	systra	fastra	mostra

Sonur hoyrir ikki til skyldskaparorðini. Felags fyri skyldskaparorðini er, at tey enda við –ir í hvørfalli eintali, men við –ur í hinum trimum føllunum, uttan faðir, sum endar við –ir í øllum føllum í eintali.

Sagnorð

At lesa, at skriva, at rokna

Sagnorð eru sterkt bend, tá ið sjálvljóðið inni í stovnunum broytist (-ur)

Sagnorð eru veikt bend, tá ið tey fáa tátíðarendingarnar -aði, -di og -ti (-ir)

Navnháttur	at liva	at senda	at svimja	at mala
Nútíð eintal	hann livir	hann sendir	hann svimur	hann melur
Tátíð eintal	hann livdi	hann sendi	hann svam	hann mól
Tátíð fleirtal	teir livdu	teir sendu	teir svumu	teir mólu
Lýsingarháttur	hava livað	hava sent	hava svomið	hava malið

Søguháttur	Boð, frásagnir, frágreiðingar o.s.fr. Tórur *fer* sær ein túr.
	Sagnorðið stendur í ymiskum tíðum.
Navnháttur	At taka, at svimja (endar altíð við -a)
Boðsháttur	Svara, skriva, farið, komið, latum okkum (fleirtal altíð -ð)
Lýsingarháttur	Í nútíð hevur endingina- andi, sum takandi, skrivandi
	Í tátíð endar í hvørkikyni við -ð, sum tikið, skrivað
Háttarsagnorð	At eiga, at kunna, at mega, at munna, at skula, at vilja
Hugsháttur	Jesus *fylgi* tær, hann leingi *livi*, Gud *signi* Føroyar, *gævi*

Gerðsøgn	Hann heilsar, hann heilsaði, teir heilsaðu o.s.fr.
Miðalsøgn	Hann heilsast, hann heilsaðist, teir heilsaðust o.s.fr.
Tolsøgn	Hann verður heilsaður, hann varð heilsaður o.s.fr.

Lýsingarorð

Hann er *sterkur*, hon er *vís*, tað er *stórt*

Lýsingarorð lýsa hann, hana ella tað

Lýsingarorð eru sterkt bend, tá ið tey enda við sjálvljóði og hjáljóði hvørt um annað (fløkjasligari enn veika bendingin) t.d. sjúkur, sjúk, sjúkt

Eintal	kallkyn	kvennkyn	hvørkikyn
Hvørfall	-ur	-	-t
Hvønnfall	-an	-a	-t
Hvørjumfall	-um	-ari	-um
Hvørsfall	-s	-rar	-s

Lýsingarorð eru veikt bend, tá ið tey enda við sjálvljóði í øllum føllum í eintali og fleirtali t.d. sjúki, sjúka, sjúka

Eintal	kallkyn	kvennkyn	hvørkikyn
Hvørfall	-i	-a	-a
Hvønnfall	-a	-u	-a
Hvørjumfall	-a	-u	-a
Hvørsfall	-a	-u	-a

Lýsingarorð verða bend í trimum stigum:	grundstig	miðstig	hástig
	gamal	eldri	elstur
	langur	longri	longstur

Fornøvn

Persónsfornøvn - 1., 2. og 3. persónur

Hvørfall	eg	tú	hann	hon	tað
Hvønnfall	meg	teg	hann	hana	tað
Hvørjumfall	mær	tær	honum	henni	tí
Hvørsfall	mín	tín	hansara	hennara	tess

Hvørfall	vit	tit	teir	tær	tey
Hvønnfall	okkum	tykkum	teir	tær	tey
Hvørjumfall	okkum	tykkum	teimum	teimum	teimum
Hvørsfall	okkara	tykkara	teirra	teirra	teirra

Afturbent fornavn	- seg, sær, sín - vísir aftur til grundlið bæði í eintali og fleirtali
Ognarfornøvn	- mín, tín, sín, vár, hennara, hansara, okkara, tykkara, teirra
Ávísingarfornøvn	- tann, hin, hesin, hasin
Afturbeind fornøvn	- ið, sum
Spurnarfornøvn	- hvør, hvat, hvussu, hvaðani, hvagar
Óbundin fornøvn	- ein, onkur, nakar, annar, annarhvør, báðir, hvørgin, eingin, hvør (tá ið hvør ikki er spurnarorð)

Kenniorð

Óbundna kenniorðið – ein, ein og eitt

Bundna kenniorðið – hin, hin, hitt

Talorð

Grundtøl - ein, tveir, tríggir, fýra... tríati, sjeyti, hundrað, tvey hundrað...

Raðtøl - fyrsti, annar, triði, fjórði...

Skiftitøl - einir, tvinnir, trinnir...

Hjáorð

Staðarhjáorð - T.d. her, har, uppi, niðri, úti, heima, inni, uttarlaga, higar, hagar, oman, niðri

Tíðarhjáorð - T.d. nú, tá, meðan, ofta, leingi, áður, í áðni, aftur

Munarhjáorð - T.d. nakað, nógv, nóg, avbera, sera

Lýsingarhjáorð - T.d. væl, illa, árla, síðla, frálíka, dúgliga, fagurliga, harðliga

Onnur hjáorð - T.d. beinleiðis, áleiðis, miðskeiðis, kortini, øðrvísi, onkursvegna

Spurnarhjáorð - hvør, hvar, hví, hvussu, nær, hvat, hvønn

Fyrisetingar

Fyrisetingin stýrir orðinum, hon stendur saman við:

Hvønnfalli stýra t.d. um, ígjøgnum

Hvørjumfalli stýra t.d. frá, hjá, undan

Hvørfalli og hvørjumfalli stýra t.d. á, í, eftir, fyri, við, yvir

Hvørsfall stýra t.d. millum, til, vegna, innan, uttan (hesi kunnu eisini stýra hvønnfalli)

Sambindingarorð

Javnskipaði sambindingarorð	- og, bæði - og, ella, hvørki - ella, annaðhvørt - ella, men
Innskipandi sambindingarorð	- t.d. at, so, so at, tí, tí at, av tí at, um annars, sum, alt, tó at, hóast, táið, meðan

Miðalvarpingar

Miðalvarpingar eru smáorð ella ljóð og verða ikki bendar.

T.d. Oh! Oy! Hygga-síggj! Kúst! Ass!